**SKRÁSETING FØROYA**
FELAGSSKRÁSETING
Postboks 264 - 110 Tórshavn - Tlf. +298 35 6010 - Fax +298 35 6015 – T–postur: skr@skraseting.fo

# 1. januar 2012 verður nýggj vinnufelagslóg sett í gildi.

Frá 1. januar 2012 verður løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg galdandi.
Ásetingarnar um eigarayvirlit verða settar í gildi seinni við kunngerð.

Parta- og smápartafeløg, sum nú verða kallaði kapitalfeløg, fáa nú, undir ávísum treytum, nakrar léttar og valmøguleikar í vinnufelagslógini, t.d. hesar:

- Avgerð kann takast um at felagskapitalurin við stovnan, kann gjaldast inn partvís. Tó skulu í minsta lagi 80.000 kr. vera goldnar inn í smápartafeløgum og 125.000 kr. í partafeløgum.

- Í ávísum førum kann sleppast undan metingarfrágreiðing við at innskoti av øðrum virðum við stovnan.

- Tað ber til at lata avís sløg av fíggjarligum stuðli við egnum peningi hjá kapital-felagnum (stuðul til sjálvsfígging)

- Samanleggingaræltlan og kloyvingaræltlan kann veljast frá í smápartafeløgum

- Váttan frá metingarmanni um støðuna hjá kreditorunum kann veljast frá við samanlegging (fusión) og kloyving

Sí lógina her:

http://www.logir.fo/system/foframe.htm